Nr. 5/2019

Djóni Nolsøe Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um ljóðdálking, settur landsstýrismanninum í vinnu- og umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað fyri at tryggja heimafrið hjá fólki, sum búgva í økjum, har ljóðdálking frá skipum er ein trupulleiki?

2. Um so er, hvussu ætlar landsstýrismaðurin at loysa trupulleikan við manglandi heimafriði?

Viðmerkingar:
Felagið Heimafriður hevur seinastu tíðina arbeitt nógv við at varpa ljós á trupulleikan við ljóðdálking frá skipum, sum ger seg galdandi í fleiri økjum í landinum m.a. í Saltangará, Runavík, á Signabø, í Fuglafirði og aðrastaðni. Hesar áheitanir um at tryggja heimafrið, eiga vit, eftir mínum tykki, at taka í álvara.

Talan er ikki bara um óskaðiligt órógv í gerandisdegnum, tí nógv og jøvn ljóðdálking hevur beinleiðis ávirkan á heilsuna hjá fólki. Í oktober mánaði í fjør gav altjóða heilsustovnurin, WHO, út umhvørvisleiðreglur fyri Evropa, har víst verður á, at óljóð er ein vandi fyri bæði likamligu og sálarligu heilsuna. Eisini hava læknafakligir myndugleikar í Føroyum gjørt vart við, at tað er neyðugt at taka ljóðdálking í álvara.

Ein máti at loysa trupulleikan er at tryggja skipunum atgongd til landsstreym. Í Noreg veitir landið stuðul til kommunurnar fyri íløgur í landsstreym. Hetta er ein loysn, sum kundi verið verd at hugt at. Umráðandi er, at felags reglur verða gjørdar fyri alt landið, so trupulleikin ikki bara verður fluttur úr einari havn í aðra, men endaliga loystur.

Á Løgtingi, 7. oktober 2019

Djóni Nolsøe Joensen